## Capello stúrir fyri Champions League

Enski landsliðsvenjarin Fabio Capello vónar ikki, at finalan í Champions League í mai verður millum tvey ensk feløg. Ongland verður við í HM endaspælinum í Suðurafrika, sum byrjar í juni, og Capello heldur, at Champions League finalan kann gerast ein vansi fyri landsliðið.
- Teir spælarar, sum vinna kappingina, verða á toppinum sálarliga, men teir, sum hava tapt, fáa trupult við at koma fyri seg kropsliga og sálarliga til HM endaspælið, sigur Capello.



## Ivi um Woodgate

Jonathan Woodgate verður roknaður millum bestu verjuspælarar í Onglandi, men hann hevur verið illa plágaður av skaðum á sínari yrkisleið, og nú er aftur galið. Woodgate hevur bert spælt tríggjar dystir fyri Tottenham í ár, tí ein gamal skaði í lærkrikanum argar aftur. Venjarin hjá Tottenham, Harry Redknapp, sigur, at hann veit ikki, nær Woodgate verður tøkur aftur. Ivi er um, hvussu Woodgate skal viðgerast fyri skaðan.

### VÍF-Neistin 35-38 (24-22):

# VÍF í trongum skóm

**Neistin hevði neyðuga sálarliga yvirskotið, tá botnliðið úr Vestmanna royndi at vinna seg av aftasta plássinum**



Uni Holm Johannesen

- Móti endanum hava neistamenn meira orku og vit renna aftaná. Tí fáa teir fleiri løtt mál og vinna dystin.

Áki G. Olsen segði tað væl í Kringvarpinum eftir dystin. At Neistin dugdi betur í avgerandi minuttunum. Tí tað júst tað sum avgjørdi, at VÍF komandi vikuna er á aftasta plássinum í bestu mansdeildini.

Lagið hevur verið betri í Vestmanna. Ítróttarstoltleikin – VÍF – er í trongum skóm og er í løtuni á niðurflytingarplássinum. Ein støða, sum vestmenningar eru púra óvandir við. Ein støða, sum Sámal Joensen, Agnar Joensen og Áki G. Olsen sjáldan hava roynt. Ein støða sum skal vendast skjótast gjørligt.

### Nær við

"Liðið er ongantíð betri enn seinasti dysturin vísir" er eitt hugtak, sum ítróttarfólk ofta nýta. Og við hesum í huga sær ikki heilt galið út hjá VÍF.

Tí vestmenningar vóru nær við at vinna stig frá oddaliðnum Neistanum, sum vitjaði í Vestmanna í gjár. Í ein samfullan tíma leiktu liðini í óvanligari høgari leikferð, tá gestirnir úr høvuðsstaðnum høvdu neyðuga sálarliga yvirskotið og megnaðu at binda um heilan fingur í seinastu løtu.

Undan steðginum riggaði álopsspælið hjá báðum liðum serstakliga væl. Hugflog, ferð og dirvi var grundarlagið fyri, at heili 46 mál vórðu skotin í fyrra hálvleiki. 24 til VÍF og 22 til Neistin. Talan var somuleiðis um málríkasta fyrra hálvleikin í hesum kappingarárinum.

Sálarliga vóru gestirnir betur við eftir hvíldina. Teir ansaðu væl eftir vestmenningunum, og tá tað av álvara ráddi um at halda høvdið kalt, riggaði betur hjá bláa oddaliðnum. Teir skutu neyðugu málini, men troyttu vestmenningarnir ikki høvdu meira krút.



Stóru skjúttarnir høvdu rúmar ræsur í Vestmanna. Her er Heini Hanusarson ávegis eitt av sínum sjey málum Mynd: Álvur Haraldsen

### Kann broytast skjótt

Tað er lætt at sita við knappaborðið í desember og siga, hvør fer at flyta niður – um Team Klaksvík vinnur næstbestu deildina, væl at merkja. Stigatalvan prógvar, at VÍF higartil eru vánaligasta liðið í Atlantic Airways-kappingini.

KÍF og VÍF stríðast í løtuni fyri lívinum í bestu deildini. Og meðan kollfirðingar vinna stig í heilum, royna vestmenningar at venda skútuni. Við dystinum í gjár í hyggju sær ljóst út. Men tað er einki at ivast í, at sigursvanda VÍF skal brynja seg til eitt stríð sum krevur tár, sveitta og blóð. Tí tað verður avgerandi, tá vit einaferð skulu umrøða seinasta leikumfar.

### FAKTA

**VÍF-Neistin 35-38 (24-22)**
**10 min:** 7-6
**20 min:** 18-15
**40 min:** 29-29
**50 min:** 32-33
**Málskjúttar**
**VÍF:** Sámal Joensen 9(3), Bjartir Hansen 9, Regin Joensen 7, Agnar Joensen 5(1), Áki Olsen 2, Áki G. Olsen 2, Niels Andreasen 1
**Neistin:** Finnur Hansson 11(1), Heini Hanusarson 7, Jugoslav Djumic 7, David Edvardsen 6(2), Tróndur Kragesteen 4, Sjúrður Thomassen 2, Áki Mørk 1
**Brotskøst:** VÍF 5, Neistin 5
**Útvísingar:** VÍF 3, Neistin 2
**Diskvalifikatión:** Neistin 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Hans Thomassen & Hanus Kúrberg

### StÍF-KÍF 25-29 (14-10):

# KÍF letur upp fyri øllum

**Eftir at hava verið púra sørt botnlið, hevur KÍF bitið somikið væl frá sær seinastu umførini, at teir nú eru eins seriølsir finalubiðlar sum eitt og hvørt annað lið**



Jákup Mørk

Talan er kanska ikki um vakrasta hondbóltsspælið í landinum. Og fleiri ferðir hava kollfirðingar hoyrt, at teir ikki spæla nóg væl.

Men tá tað kemur til at stríðast fyri sakini, so er eingin, sum tyikist standa kollfirðingum kurl. Og tað gjørdu strandingarnir heldur ikki, tá teir leygardagin spældu heimadyst móti KÍF.

### Vendu vónloysinum

Heimaliðið tóktist annars at hava tamarhald á tí mesta so at siga allan dystin. Seinastu løtuna undan steðginum drógu teir veruliga frá, og so ráddi einamest um at halda tamarhald á støðuni.

Tað gekk eisini so hampuliga væl gjøgnum seinna hálvleik. Fleiri ferðir hótti KÍF við at taka leiðsluna, men StÍF helt nevið frammanfyri. Men sjey minuttir fyri leiklok glapp dysturin heimaliðnum av hondum.

StÍF hevði annars skorað til 24-23, men seinastu løtuna vann KÍF ikki minni enn 6-1, og so kundi restin fyri tað vera tað sama.

Kollfirðingarnir høvdu enn einaferð prógvað, at teir gevast ikki á hondum, fyrr enn dómarin hevur bríksláð fyri seinastu ferð. Enn sum áður er setningurin at vinna seg úr botninum. Men mongu sigrarnir seinastu umførini hava sum bonus havt við sær, at kollfirðingar nú eisini so smátt kunnu tosa við um finalupláss. Í tí kapprenningini eru teir nevnliga bara trý stig aftan fyri StÍF.

### FAKTA

**StÍF-KÍF 25-29 (14-10)**
**10 min:** 3-4
**20 min:** 8-7
**40 min:** 18-15
**50 min:** 22-21
**Málskjúttar**
**StÍF:** Cristian Preda 6, Pauli G. Hansen 6, Bárður B. Danielsen 3, Gabriel Stanciu 3(3), Jógvan Joensen 3, Mortan Hansen 2, Jørmund Hansen 1
**KÍF:** Ási Dam 9(5), Niklas Reginsson 5, Jákup Trygvason 5, Rógvi Weyhe 3, Teitur Joensen 3, Tony Weyhe 2, Gert Hansen 2
**Brotskøst:** StÍF 3, KÍF 5
**Útvísingar:** StÍF 2, KÍF 3
**Dómarar:** Andrias Hansen & Heri Petersen